

# Jólakonsert á Eiði

Leygarkvøldið 20. desember kl. 20.00 verður kirkjukonsert við Lindu Andrews í Eiðis kirkju. Við klaverið verður Gunnar Guttesen. Linda Andrews fer at framføra nýggjar og gamlar jólasangir, bæði á føroyskum og enskum. Millum annað "Breath of Heaven" frá hennara egnu fløgu, og "I´m dreaming of a White Christmas", "God rest ye Marrys Gentlemen", "Who could imagine a King" og aðrar jólasangir. Konsertin er stuðla av Eiðis prestagjaldið og er ókeypis.




*Systrarnar, Annika og Ása Andreasen, við virkinum Synergi standa aftanfyri tiltakið, »Ársins Leiðaradagur 2009«*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Ársins leiðari

Vanligt er eisini at velja ársins leiðara, og tað verður eisini hesaferð. Fyrr eru Magni Arge, Marner Jacobsen, Andras Róin og Christian Nagata valdir til ársins leiðarar. Serligt er, at ársins leiðari frá árinum frammanundan setur tiltakið, so Christian Nagata setur tiltakið.

Øll kunnu innstilla fólk til ársins leiðara, men tað er ein dómsnevnd, sum útfrá nøkrum kriterium velur ársins leiðara.

Hesaferð eru Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, Mary í Garði, stjóri í Nærverkinum og Reidar Nónfjall, rektari á Handilsskúlanum.

- Fyrr er ongin almennur leiðari valdur til ársins leiðara, og tí hava vit hesaferð valt at skipa fyri tveimum tilnevningum. Eina til ein almennan leiðara og eina til ein privatan, greiða Ása og Annika Andreasen frá.

**eij**

# Leiðarar hittast

**Fríggjadagin 23. januar 2009 hittast leiðarar úr tí almenna og privata til tiltakið »Ársins Leiðaradagur 2009« við undirheitinum »Heimurin í kreppu.« Fyriskiparanir løgdu í dag skránna til leiðaradagin fram, har miðað verður eftir at finna amboð til at styrkjast av eini kreppu**

TILTAK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fýra ferðir áður hava leiðarar í Føroyum hitst til tiltakið, har millum annað ársins leiðari verður valdur. Munurin millum hetta tiltakið og tey undanfarnu, er, at í dag eru niðurgangstíðir. Burtur úr hesum vilja fyrireikararnir, Ása og Annika Andreasen, skapa ein dag, har leiðarar í Føroyum kunnu vinna sær betri fyritreytir í eini kreppu, enn mann hevði fingið, um mann onki gjørdi.

- Kreppa er nakað, ið upptekur øll, og tað vísir seg, at fólk eru glað fyri, at onkur roynir at gera okkurt við tað, greiðir Annika Andreasen frá. Systurin, Ása Andreasen, leggur afturat, at tað kanska er rímiliga ógvusligt at kalla tiltakið »Heimurin í kreppu,« men at tær meta at fyri at loysa ein trupulleika, má mann kenna hann.

Á skránna hava tær fingið fleiri nøvn, sum tær meta vera kompetent at finna loysnir til ymiskar trupulleikar.

### Høvuðsrøðarar

Ein av høvuðsrøðarunum er Stine Bosse, ið er administrerandi stjóri fyri Tryg og konsernsjefur í TrygVesta. Hon skal, sambært fyrireikarunum, greiða frá, hvussu mann megnar at selja trygd til fólk í kreppu-tíðum. Hon hevur altíð starvast í tryggingarfelagnum Tryg, og hevur arbeitt seg upp á toppin í fyritøkuni.

- Mann sigur populert, at ein leiðari ikki nýtist at kenna produktið, fyri at kunna leiða eina fyritøku, men Stine Bosse kennir, í hvussu so er, sína fyritøku, sigur Ása Andreasen.

Hin høvuðsrøðarin verður Leif Chr. Mikkelsen, ið er stjóri í Team Copenhagen, sum arbeiðir fyri at gera Keypmannahavn til besta ítróttarbý í Norðurlondum.

- Hann hevur verið landsliðsvenjari hjá Danmark í hondbólti, og ofta hoyrir mann um, hvussu fólk innan ítróttina nýta sína vunnu vitan í vinnulívinum, men hann snakkar um, at mann kann nýta tað umvent eisini, greiðir Annika Andreasen frá.

Aðrir fyrilestrar verða eisini, har fólk úr føroyskari vinnu og onnur, fara at hava workshoppir, har tey greiða frá ymiskum loysnum til trupulleikar.

### Ársins virki

Í mun til undanfarin ár, verður ársins virki, Articon, eisini umboðað á degnum, har tey greiða frá teirra virksemi, og hvussu mann gerst ársins virki.

Harumframt verður Jógvan Fríðrikson, bispur, eisini umboðaður, har hann fer at greiða frá, hvussu vanarnir hjá fólki eru í eini kreppu.

### Spjatt um býin

Hóast fyrsti parturin av tiltakinum verður á Hotel Føroyum, verður ein hugnaligur partur eisini gjørdur. Ætlanin er nevniliga at hava ein part í Miðlahúsinum, har veitsla verður.

- Umframt fyrilestrarnar, er ein stórur fyrimunur við tiltakinum, at mann kann betra um netverkini hjá sær. Tað, og at Synergi nú verður fimm ár, er orsøkin til at vit hava valt eina veitslu, greiða systrarnar, Ása og Annika Andreasen, frá.